**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 0992**
**Tíðarskeið 5/11-9/11-2009**

---

**Fólk frá HAV.:** Mourits M. Joensen og Regin Kristiansen.
Kirk O´Donnald. (ein amerikanari).

**Ábyrgd:** Bogi Hansen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir teimum fýra standardskurðunum.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu og ein havsvívari.

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 5/11 kl. 1800. Siglt varð eystur á støð N1, har vit byrjaðu skurðin og tóku støðirnar norðureftir, vit tóku allan skurðin norður á 64°30N.
Sigldu so móti støð V19 á skurði V. Á vegnum tóku vit ein havsvívara upp, sum hevði verið úti síðan fyrst í september.
Vit byrjaðu at taka skurð V kl.2045 tann 7/11 og tóku hendan skurðin inn ímóti Trøllhøvda.
Tá liðugt var at taka skurð V, sigldu vit á Havnina við Kirk O´Donnald, men fóru út aftur beinan vegin. Haðani sigldu vit suður á skurð S, sum vit tóku móti Hetlandi, men bert á miðlinjuna, tí vit høvdu onki loyvi fingið til at fara í bretskan sjógv.
Frá skurði S sigldu vit norður á skurð E, har vit byrjaðu á støð E8, og tóku hendan skurðin inn móti Nólsoy.
Tá liðugt var leitaðu vit eina løtu eftir einari fortoying hjá Eilif, men funnu hana ikki.
Vit vóru aftur á Havnini mánadagin 9/11 kl. 2330.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 47 støðir og saltprøvar á øllum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir eru analyseraðir.

**Viðmerkingar:**

06-01-2010 __________________________
Regin Kristiansen

Vend



Støðir og kósir á túri 0992